LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Økistænastan í Sandoyar sýslu
Stílað Gerhard Lognberg, stýrisformanni
Miðgøta 8
210 Sandur

Tórshavn, tann 11. oktober 2016
J.Nr.: LUM-28- 16/00024-35
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Viðv. setan av leiðara fyri Økistænastuna í Sandoyar sýslu**

Í áliti mínum, dagfest 30. juni í ár, viðgjørdi eg eina klagu um fyrisitingarligu viðgerðina hjá stýrinum fyri Økistænastuni í Sandoyar sýslu av málinum um at seta leiðara fyri Økistænastuna.

Úrslitið av viðgerðini varð, at eg heitti á stýrið fyri Økistænastuna um at taka málið uppaftur til nýggja viðgerð. Hetta grundaði eg á, at einki skrivligt tilfar lýsti setanartilgongdina ella setanaravgerðina, og eg metti ikki eftirfylgjandi frágreiðingina frá stýrinum um málsviðgerðina vera nøktandi. Eg grundaði eisini áheitanina um uppafturtøku av málinum á, at klagararnir, hóast fleiri áheitanir um hetta, ikki høvdu fingið nakra skrivliga grundgeving fyri avgerðini í málinum.

Av tí, at eg einki frætti aftur um málið, heitti eg tann 6. september 2016 á stýrið um at greiða mær frá støðuni í málinum.

Tann 8. september 2016 boðaði formaðurin í stýrinum frá, at málið var til viðgerðar, og at stýrið væntaði at svara umboðsmanninum innan rímiliga tíð. Formaðurin í stýrinum vísti á, at vantandi skrivliga tilfarið, sum varð umrøtt í mínum áliti, av misgáum mátti verið komið á skeivt stað, og at tilfarið fór at verða sent umboðsmanninum saman við eini frágreiðing um málið.

Tann 19. september 2016 sendi stýrisformaðurin skjølini í málinum og greiddi samstundis soleiðis frá:

> “... Nú senda vit tilfarið aftur, sum er gjørt áður. Hvat er hent, er óskiljandi og hevur sett okkum í nevndini í Økistænastuni í eitt sera ringt ljós, bæði hjá høgum og lágum, lat tað fara.
>
> Vit yvirtóku eldraøkið, sum onnur økir gjørdu, vit eru tað minsta samstarvið í landinum. Men vit hava havt tað nokk so trupult.
>
> A, sum var leiðari, beint áðrenn vit yvirtóku, bað um farloyvi í 2 ár.

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

> Síðan kom H aftur í starvið, tað vóru vit glað um, men mitt í øllum fór hon aftur í starvið í Heilsumálaráðnum.
>
> Síðani endaði tað við, at vit søktu eftir nýggjum leiðara og settu E.
>
> Her frá og til dagin í dag vita øll, hvussu tað hevur gingist."

**Viðv. skjalagrundarlagnum**
Skjølini 1 – 12, sum stýrisformaðurin hevur sent umboðsmanninum í september 2016 eru útskriftir úr gerðabókini hjá stýrinum fyri Økistænastuna. Í váttaðu útskriftunum, sum tykjast vera ein orðarøtt endurgeving av samanhangandi fundum hjá stýrinum, verður í høvuðsheitum endurgivið, at avgerð varð tikin um at lýsa starvið leyst, hvørjir umsøkjararnir vóru, hvar setanarsamrøðurnar skuldi vera, og hvørjar spurningar stýrið setti umsøkjarunum undir setanarsamrøðunum. Sambært útskriftini av gerðabókini varð á seinasta fundinum atkvøtt um umsøkjararnar, og úrslitið varð, at E varð sett í starvið.

Aftrat hesum skjølunum fekk umboðsmaðurin avrit av skjølum, sum umboðsmaðurin longu frammanundan hevði fingið, og sum partvíst eru endurgivin undir partshoyringini í álitinum, dagfest 30. juni 2016 (skjølini nr. 13 – 27).

Útskriftirnar úr gerðabókini vísa í høvuðsheitum, at setanarsamrøður vórðu hildnar, men einki er niðurskrivað um ítøkiligu metingarnar av førleikunum hjá umsøkjarunum, og einki tilmæli er um, hví mett varð, at tann setta var tann best egnaða. Tað ber tí framvegis ikki til hjá mær at meta um, um málsviðgerðin er farin rætt fram, ella um rætti umsøkjarin er settur í starv. Eg haldi tí fast við niðurstøðu mína hesum viðvíkjandi frá 30. juni í ár.

Eftir at hava móttikið *útskriftirnar* úr gerðabókini, bað eg um at sleppa at síggja originalu gerðabókina ella fáa *avrit* av henni. Tann 10. oktober móttók eg avrit av gerðabókini. Ein samanbering av útskriftunum og avritunum av gerðabókini vísir, at frásagnirnar í gerðabókini hjá stýrinum fyri Økistænastuna partvíst eru umskrivaðar, annað er ikki tikið við, umframt at lagt er aftrat frásagnunum.

Sambært § 8, stk. 1 í umboðsmanslógini hevur stýrið fyri Økistænastuna skyldu til at lata umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt. Fær umboðsmaðurin ikki rættar upplýsingar frá myndugleikum, verður málið ikki nøktandi upplýst. Tað at fáa nøktandi upplýsingar frá myndugleikum er grundarlagið undir málsviðgerðini hjá umboðsmanninum, og tó at tað ikki broytir grundarlagið undir niðurstøðu míni í málinum, meti eg tað vera sera átaluvert, at stýrið fyri Økistænastuna ikki gav mær rættar upplýsingar beinanvegin.

**Viðv. grundgeving**
Í álitinum skrivaði eg soleiðis um grundgevingina, sum annar av klagarunum, A, hevði krav uppá at fáa:

> "Heilsu- og innlendismálaráðið staðfesti í januar 2016, at Økistænastan hevði skyldu til at senda klagarunum eina skrivliga grundgivna avgerð sambært § 22 í fyrisitingarlógini. Sambært § 23 í fyrisitingarlógini skal grundgevingin geva eina frágreiðing um, hví avgerðin fekk ta innihald, hon fekk. Hvussu neyv grundgevingin skal vera valdast m.a.

> leiklutin hjá klagarunum undir málsviðgerðini og umstøðurnar í málinum annars. Eftir mínum tykki hevði í øllum førum A krav uppá eina neyva grundgeving av teirri orsøk, at hon sambært upplýsingunum í málinum stutt frammanundan hevði virkað sum økisleiðari fyri Heimatænastuna í Sandoyar øki í meira enn 2 ár.
>
> Undir viðgerðini av klaguni havi eg biðið um øll skjøl í málinum, herundir svar til umsøkjararnar, sum ikki fingu starvið. Millum skjølini, sum eg havi fingið, vóru eingi skrivlig svar til klagararnar. Økistænastan tykist tískil framvegis ikki, hóast fleiri umbønir frá klagarunum og avgerðina hjá kommunala eftirlitinum, hava latið við seg komið og sent klagarunum eina skrivliga grundgeving fyri avgerðini í málinum. Hetta haldi eg vera sera atfinningarsamt.“

Tann 9. september 2016, knappliga eitt ár eftir, at avgerðin varð tikin, sendi stýrið fyri Økistænastuna A eina grundgeving, sum var soljóðandi:

> ”Vit gjøgnumgingu tíni pappír og tínar royndir, har var einki at finnast at.
>
> Út frá setanarsamrøðum, fundinum sum var 23/9, og eini meting av persónligu eginleikunum hjá umsøkjarunum, varð støða tikin til at velja annan umsøkjara framum teg.
>
> Hesum boðaði eg tær frá pr. telefon 23/9-15.”

Hóast A formliga kann sigast at hava fingið eina grundgeving, er eyðsæð, at innihaldið í grundgevingini á ongan hátt livir upp til tey krøv, sum eg vísti á í niðurstøðu míni.

Grundgevingin til B, sum eisini er dagfest 9. september 2016, var soljóðandi:

> “Grundin til, at vit valdu teg frá, hóast bæði royndir og útbúgvingar, var, tí tú vísti á, at tú fór at ferðast ímillum Gomlurætt og Sandoy “pendla”. Tað hildu vit, ein meiriluti, ikki verða nøktandi, tí ferðasambandið til Sandoynna er so óstøðugt, serliga um veturin. Hetta kundi elvt til vansar í samband við útinnaninna av arbeiðinum.
>
> Hetta boðaði eg tær frá pr. telefon tann 23. september 2015.”

Í starvslýsingini varð ikki sett sum krav, at leiðarin á Økistænastuni í Sandoyar sýslu skuldi búgva í Sandoynni. Einasta umrøða av bústaði sæst vera undir setanarsamrøðuni 18. september 2015, har B er endurgivin fyri at siga, at hon búði ikki í Sandoynni og ætlaði at ferðast ímillum Gomlurætt og Skopun.

Tað sæst ikki í skjølunum, burtursæð frá grundgevingini, sum varð skrivað eitt ár seinni, at stýrið ella meirilutin í stýrinum metti tað vera neyðugt hjá økisleiðaranum at búgva í oynni, ella hvør orsøkin var til hetta, eins og hetta ikki sæst vera viðgjørt saman við umsøkjaranum. Av tí, at tað ongastaðni framgongur, at tað er ein fortreyt fyri at røkja starvið, at leiðarin er til staðar allar dagar í árinum og enn minni, at viðkomandi býr í oynni, meti eg grundgevingina um óstøðugt ferðasamband um veturin, soleiðis sum málið er upplýst fyri mær, vera ósakliga.

**Avgerðin tikin við atkvøðugreiðslu**

Eins og nevnt í áliti mínum í juni 2016, framgongur av útskrift úr gerðabókini frá fundi tann 23. september 2015, at borgarstjórarnir hava atkvøtt um, hvør umsøkjari skuldi setast í starvið. Hetta er gjørt við tilvísing til § 2, stk. 3 í sáttmálanum millum kommunurnar í samstarvinum,

har ásett er, at avgerðir á økinum heimatænasta, eldrarøkt v.m. verða tiknar við meiriluta, og at kommunurnar í samstarvinum hava atkvøður sambært fólkatalinum í hvørjari einstakari kommunu pr. 1. januar í hvørjum ári.

Í sama sáttmála er ásett í § 3, at stýrið er setanarmyndugleiki fyri Økistænastuna. Stýrið er sum almennur setanarmyndugleiki bundið av fyrisitingarrættinum og fyristingarrættarligum meginreglum og kann tískil ikki taka avgerð einans við støði í eini atkvøðugreiðslu, um málsviðgerðin er so ófullfíggjað, sum eg meti hana vera í hesum málinum.

**Niðurstøða**

Samanumtikið haldi eg framvegis ikki Stýrið fyri Økistænastuna í Sandoynni hava skjalprógvað ella greitt nøktandi frá málsviðgerðini í málinum. Eg haldi tað eisini vera sera átaluvert, at eg ikki beinanvegin fekk rættar upplýsingar í málinum. Fortreytin fyri einum munadyggum eftirliti við, at myndugleikin hevur borið seg rætt at, og at málsviðgerðin er farin rætt fram, er tí framvegis ikki til staðar í hesum málinum.

Aftrat hesum haldi eg ikki grundgevingina til A vera nøktandi, eins og eg haldi grundgevingina til B vera ósakliga.

Av tí, at eg helt talan vera um álvarslig brek við viðgerðini hjá stýrinum fyri Økistænastuna í Sandoyar sýslu í hesum málinum, varð álitið frá 30. juni 2016 samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini sent formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýriskvinnuni í kommunumálum. Avrit av hesum skrivi verður somuleiðis sent hesum somu.

Eg havi samstundis mælt landsstýriskvinnuni í kommunumálum til at viðgera niðurstøður mínar og biðið hana lata meg frætta, hvørji stig niðurstøðurnar geva orsøk til at taka í hesum máli.

Eitt navnleyst eintak av hesum skrivi verður í næstum almannakunngjørt á heimasíðuni www.lum.fo.

Vinaliga

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður